# Ein heilsan til Jóhan á Plógv, skipara, á 80 ára degnum 16. januar



Nógvir føroyingar hava gjøgnum árini gjørt vart við seg sum úrmælingar á ymsum økjum ella fyri ymiskt brøgd. Ikki er ov nógv sagt, at millum hesar føroysku úmælingar teljast nógvir skiparar, sum ikki er so løgið, havandi í huga tann stóra leiklut fiskivinnan og føroyska sjófólkið hava havt, og hava fyri hetta land.

Ein av hesum skiparum, sum eisini telist millum hesar mongu úrmælingar, er Jóhan á Plógv úr Sandavági, og nú Jóhan rundar tey 80 árini, verður henda heilsan send honum og familju hansara.

Jóhan á Plógv er sonur Martinu, ætta úr Sørvági, og Albert Thomassen, ættaður úr Sandavági. Jóhan er føddur og vaksin upp í Sandavági, sum næstelstur av 6 systkjum – 5 brøður og 1 systir. Sum flestu unglingar í Føroyum í tríatiárunum, søkti Jóhan á Plógv sum ungur sjógvin. Bert 13 ára gamal fór Jóhan til prest at biðja um at blíva fermdur, so hann kundi sleppa til skips, og fór hann í 1935 sín fyrsta túr við "Vón" hjá Sigurð Simonsen í Fuglafirði. Sjólívið bleiv eisini lívsstarv hansara, og sum bert 20 ára gamal fór Jóhan á skiparaskúla, og sum 23 ára gamal hevði hann tikið skiparaskúlan og longdina, og var klárur at takað ábyrgdina at føra skip á seg. Stóra fyritøkan tá í tíðini í Sandavági var handils- og fiskavirkið hjá J. E. Thomsen, sum eisini gjøgnum árini átti nøkur skip, og beinanvegin Jóhan var liguður við skiparaútbúgvingina, fekk hann eitt av skipunum hjá hesi fyritøku, "Royndina Fríðu" at føra. Neyðugt var enntá við serloyvi til tann bert 23 ára gamla skiparan, sum eftir tá galdandi lógini var ov ungur at verða skipari. Jóhan førdi "Royndina Fríðu" í 3 ár, og eftir hetta førdi hann "Havstein" í 3 ár. Hareftir keypti Jóhan, saman við Eivindi Rasmussen í Sandavági, koltrolaran "Venus", sum Jóhan síðani førdi í 4 ár.

Í 1946, tók handilsmaðurin J. E. Thomsen stig til at seta á stovn Sandavágs Trolarafelag, sum stutt eftir broytti navn til Samvinnufelagið, og sum við sínum 56 árum á bakið nú man verða eitt tað elsta virkandi reiðaríi í landinum. Rættuliga stórur partur av siglandi fólkinum í Sandavági tá í tíðini tók undir við hesum stigi hjá handilsmanninum, og tá samanum kom mundu eini 50 partaeigarar verða í felagnum, og millum hesar var eisini Jóhan á Plógv. Fyrsta skipi hjá hesum felag æt "Høgifossur" – ein koltrolari sum bleiv keyptur úr Onglandi í 1947. Í 1956 keypti felagið enn ein trolara – "Jegvan Elias Thomsen" – og fekk Jóhan henda trolaran at føra. Jóhan førdi "Jógvan Elias Thomsen" í 17 ár, so at siga hvønn túr. Eitt stutt skifti førdi hann eisini "Leiv Øssurson".

Fimti og seksti árini vóru eitt heilt serligt tíðarskeið í føroyskari fiskivinnusøgu við nærum fríum fiskiskapi. Skifti frá slupptíðini til hesar kraftmiklu trolararnar var stórt, og munandi léttari var nú at søkja fjarskotnar fiskileiðir. Mangt er sagt og skrivað um hesa tíðina við fiskiskapi undir Vesturgrønlandi, Newfoundlandi og í Barentshavinum, heilt eystur í Hvítahavið, og blóðið rennur skjótari í æðrunum á einum og hvørjum fiskimanni, tá vit síggja myndir frá hesi tíðini av skipsdekkum fullum av stórum toski. Men alt fær ein enda, og tá fiskimarkini í sjeytiárinum vóru flutt út á 200 fjóðringar, broyttist alt hetta. Men hóast Samvinnufelagið, og teir menn ið vóru drívmegin í hesum felag, høvdu verið við til at tryggja Føroyum tey søguligu rættindi til botnfisk, sum føroyskir flakatrolarar enn tann dag í dag dúva uppá í Barentshavinum, so fekk hetta felag ikki tillutað ein stert tá býtt varð, og hóast landsins myndugleikar hava havt ríkilig høvi til at rætta uppá hetta mistak, so er tað ikki hent enn. Eitt stutt skifti í 1974 førdi Jóhan eisini stásiliga flakatrolaran "Vesturvón" í Sørvági, og gjørdi skipið tann skjótasta flakatúrin nakrantíð við Jóhan sum skipara, tá skipið eftir bert 1 mánaða kom heim við fullari last.

Men í Samvinnufelagnum vóru menn ikki bangnir fyri at ganga nýggjar og egnar leiðir, og tá ein annar úrmælingur, vestmenningurin John Dam, í 1969 legði lunnar undir rækjuveiðu á opnum havið í Norðuratlantshavinum, gekk ikki long tíð til at eisini Samvinnufelagið avgjørdi at royna seg í hesi vinnu, og lótu teir byggja nýtt rækjuskip, sum kom til landið í 1975, og fekk hetta skip eisini navnið "Høgifossur". Bróður Jóhan, Herluf Thomassen, sum eisini var skiparalærdur, førdi hetta skip stóran part av tíðini. Men umframt at Samvinnufelagið fór uppí rækjuvinnuna, fór Jóhan eisini sjálvur, saman við svágrinum, Godtfred Joensen í Miðvági, og soninum Atla á Plógv, um nøkunlunda somu tíð uppí rækjuvinnuna, tá teir keyptu stóra trolaran "V. U. Hammershaimb", sum Jóhan og sonurin Atli skiftust at føra í 5 ár. Tíverri hepnaðist ikki so væl við hesum annars stóra og stásiliga skipið, sum ikki færri enn tvær ferðir varð herja av eldsbruna, men hetta tíðarskeiði var tó tað sum nógv minnast sum eitt tað veruliga rækjuævintýri í føroyskari fiskivinnusøgu.

Í 1980 avgjørdi Jóhan at fara í land, eftir at hava silgt sum skipari út í eitt í 37 ár, og bleiv tá settur at stjórna virkseminum hjá Samvinnufelagnum, sum hann tá var blivin størsti einstaki partaeigarin í, og hevur hann trúðliga røkt hetta starvi til henda dag. Í 1984 tók felagið sítt størsta stig nakrantíð, tá felagið lat byggja nýggjan rækjutrolara – núverandi "Høgifossur" - sum var tann størsti rækjutrolarin í Norðuratlantshavinum til fyri fáum árum síðani. Hetta skipið hevur hesi árini, meðan Jóhan hevur verið stjóri í felagnum, ført rækjur fyri umleið kr. 600 mill. til landið, umframt at hava verið við til at tryggja Føroyum søgulig rækjurættindi í Barentshavinum og á Flemish Cap.

Jóhan á Plógv hevur gjøgnum árini røkt mong álitisstørv. Tvey tíðarskeið var hann limur í bygdaráðnum í Sandavági, men annars hevur hann ikki verið uppi í politiskum virksemi. Jóhan var í nógv ár formaður í Felagnum Rækjuskip og luttók javnan saman við umboðum fyri landsstýrið, sum limur í føroyskum sendinevndum, sum fóru uttanlands til fiskirættindasamráðingar. Jóhan var eisini í fleiri ár nevndarlimur í flakavirkinum Snarfrost í Miðvági, sum Samvinnufelagið var við til at leggja lunnar undir.

Fyri øll tey mongu ið kenna Jóhan, og sum gjøgnum arbeiði á sjógvi og landi, hava havt samband við hann, er hann ímyndin av einum av teimum góðu og siðiligu skiparunum og vinnulívsmonnunum, sum njótað stóra virðing allastaðni. Og í privata lívinum njóta abbabørnini gleði av hansara barnagóða lyndi, sum ivaleyst er lagt honum í blóðið av móðurini.

Jóhan giftist í 1946 Ragnhild, dóttir Óla Jákup Petersen á Steig í Sandavági. Tey eiga 4 børn, Johnfinn, Marjun, Atla og Aibritt, og hóast Jóhan var nógv burtur meðan børnini vóru smá, so hava Ragnhild og Jóhan megna at lagt nógv gott niður í børn síni, við eini uppaling ið byggir á kristnu trúgv foreldranna, har trúfesti, erligheit og sakligheit eru meginreglurnar.

Jóhan er burturstaddur á føðingardegnum, men eg vil tó nýta høvi til at ynskja tær hjartaliga tillukku á føðingardegnum, við ynskjum um blíðan byr í komandi tíðum, og somuleiðis at ynskja konu og børnum tínum tillukku við manni og pápa.

**hj**

## Minningarorð um

# Jonnu Andreasen,

## Streymnes



At Jonna ikki er okkara ímillum longur er so ófatiligt, at vit skilja tað als ikki. Hon kom jú glað og væluppløgd, sum altíð, til arbeiðis henda morgunin og ynskti okkum øllum eitt gott nýggjár.

Løtu seinni, mitt sum vit standa í okkara arbeiði, bleiv hon sjúk, og eitt døgn seinni, ikki longur okkara millum.

Jonna var ein persónligheit, altíð glað, og vit nýttu at arbeiða saman við henni. Hon var so erlig og vit vistu altíð, hvar vit høvdu hana. Hon var samvitskufull – hennara partur lá ongantíð eftir, og kaffipausurnar saman við henni vóru altíð so hugnaligar og skemtiligar.

Góða Jonna, minnið um teg fer altíð at búgva í hjørtum okkara. Tankar okkara leita til Eyðun, børnini, svigarson og ommubørnini. Tit hava mist so ómetaliga nógv. Má Harrin hjálpa tykkum í sorgini. Ærað veri minnið um Jonnu Andreasen.

**Starvsfelagarnir**



# Eingin næmingur til próvtøku í ár

**Blokadan hjá Føroya Lærarafelag mótvegis Mentamálastýrinum stendur við. Hon hevur við sær, at allar skrivligu próvtøkurnar í 9. og 10. flokki í ár verða av ongum, um ikki Mentamálastýrið í tólvta tíma avgreiðir viðurskiftini viðvíkjandi savnsrøktini og KT-vørðunum í fólkaskúlanum**

FÓLKASKÚLIN

*Turið Kjølbro*

Føroya Lærarafelag noktar framvegis limum sínum at gera skrivligu uppgávurnar til próvtøkurnar í 9. og 10. flokki fyrr enn Mentamálastýrið hevur fingið viðurskiftini viðvíkjandi savnsrøktini og KT-vørðunum í fólkaskúlanum í rætt lag. Fíggjarmálastýrið vil vera við, at landsins myndugleikar bert eiga at rinda fyri tað námsfrøðiliga viðvíkjandi KT-vørðunum, meðan kommunurnar eiga at rinda fyri tað tekniska. Savnsrøktina eiga kommunurnar skylduna at røkja og harvið gjalda alla sum hon er. Tískil skal Mentamálastýrið avgreiða hesi viðurskifti við kommunurnar, men tað er ikki gjørt hóast longdar freistir og eina blokadu. Eina blokadu, ið fær álvarsligar avleiðingar fyri teir nógvu næmingarnar í 9. og 10. flokkunum kring landið longu í summar.

Blokadan, sum hevur ógvuliga álvarsligar avleiðingar við sær, varð sett í verk í fjør summar. Lærarar, sum vanliga gera uppgávur til próvtøkurnar til fráfaringarroynd fólkaskúlans og víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans, eru sostatt ikki farnir til verka.

- Hóast tað ikki er okkara uppgáva at samráðast við kommunurnar um savnsrøktina og KT-vørðarnar, hava vit boðið okkum til at hjálpa Mentamálastýrinum hesum viðvíkjandi, men tey leggja ikki í okkara hjálp, hóast tey ikki koma víðari í samráðingunum. Mentamálastýrið vil hava okkum at avlýsa blokaduna kortini, men tað kemur ikki uppá tal. Tey hava fingið ríkiligt av tíð fyri at fáa viðurskiftini uppá pláss, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag.

## Til fánýtis

Mentamálastýrið hevur eftir øllum at døma til fánýtis roynt at fingið kommunurnar at yvirtaka fíggjarligu skyldurnar av savnsrøktini og KT-vørðunum. Sum skilst góðtekur Kommunusamskipan Føroya, at kommunurnar varða av søvnunum og amboðunum, men felagsskapurin vil hava pengar at gjalda røktina fyri frá landinum.

- Smáu kommunurnar góðtaka als ikki av, at tær eiga uppgávuna og útreiðslurnar av savnsrøktini, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

Uppgávugerð er ikki tænastuskylda, og tí kann Føroya Lærarafelag nokta limum sínum at gera hetta arbeiðið, til viðurskiftini viðvíkjandi savnsrøktini og KT-vørðunum eru komin upp á pláss. Undir vanligum umstøðum fara ávísir lærarar, sum Mentamálastýrið heitir á, longu við skúlaársbyrjan undir uppgávugerð til próvtøkurnar árið eftir, og hesar plaga at verða lidnar áðrenn árslok, tá ið tær skulu prentast.

- Málið við savnsrøktini hevur verið ein brennandi spurningur seinastu tredivu árini. Limir okkara hava gjørt tað ókeypis øll hesi árini. Freistin hjá Mentamálastýrinum til at fáa viðurskiftini uppá pláss var 1. august 2000. Somuleiðis hevur freistin at fáa viðurskiftini hjá KT-vørðunum í rætt lag verið long, uttan at nakað er hent. Álit er skrivað, sum útgreinar arbeiðsøkið hjá teimum. Og hóast vit hava boðið okkum fram til at hjálpa Mentamálastýrinum at sannføra kommunurnar um teirra skyldur, hendir einki. Hvør rindar fyri hvat ger okkum ikki mun, bara okkara limir fáa tað teir eiga at fáa um teir gera arbeiðið. Fyri at lærara kunnu undirvísa, skulu høli, tól og amboð vera í lagi. Men hvør røkir tey, er ikki trupulleikin, men limirnir hjá okkum skulu fáa lønina um teir gera tað, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.



*Hendir einki munagott rættiliga skjótt, sleppur eingin næmingur í 9. og 10. flokki í føroyska fólkaskúlanum til skrivliga roynd í summar. Og tær fær stórar avleiðingar fyri næmingarnar*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

Forkvinnan í Føroya Lærarafelag er væl greið yvir, hvørjar avleiðingar blokadan hevur fyri næmingar.

- Ábyrgdina av, at næmingarnir ikki sleppa til skrivliga próvtøku í summar, hava Mentamálastýrið og kommunurnar.

Mentamálastýrið kann valla heita á onnur um at gera skrivligar uppgávur til próvtøkurnar í føroyska fólkaskúlanum enn akkurát føroyskar lærarar. Skúlin er júst yvirtikin og tískil hevði verið pínligt, um landsins skúlamyndugleikar verða noyddir av landinum, eitt nú niður til danska kenslumálaráðið, eftir próvtøkutilfari, ið eru ætlaðar donskum næmingum. Ein annar líka áhugaverdur spurningur er, hvussu leingi foreldur lata sær hesa støðu lynda.

Olaus Jespersen, leiðari á fólkaskúladeildini í Mentamálastýrinum, hevur onga viðmerking til málið.


"Tann, sum heldur, at hann hevur lagt útbúgving afturum seg, er farin meira afturum, enn hann er útbúgvin."

Poul Jørgensen



## Starvsfólk til Kundadepilin á Føroya Tele

Søkt verður eftir fólki til Kundadepilin

Í Kundadeplinum verða allar telefontænastur á Føroya Tele avgreiddar. Í januar 2002 er ætlanin at seta á stovn ein kundadepil, sum hevur førleikar innan avrokning, skráseting, internetsupport og tekniska kundasupport. Við hesum vil kundin merkja, at tað er léttari at koma í samband við Føroya Tele og harvið fáa eina góða viðgerð.

Til bólkin søkja vit eftir fólki. Vit koma í fyrstu atløgu serliga at leggja dent á at menna førleikar innan hjálp til internetnýtslu hjá kundum. Tey, sum sett verða, skulu verða til reiðar at gjøgnumganga eina innanhýsis útbúgving og luttaka í kundatænastu innan øll øki.

**Umsøkjararnir skulu:**
- vera fyrikomandi
- vera ágrýtnir og næmir
- duga at laga seg eftir umstøðum, sum broytast
- kunna undirvísa starvsfeløgum

**Vit vænta, at teir hava:**
- góðan teldukunnleika
- førleikar innan uppseting og tillaging av teldum
- førleikar innan internet, bæði á brúkarastøði, men eisini skilja tøknina aftanfyri
- góðan málkunnleika – munnligt føroyskt, skandinaviskt og enskt
- royndir við kundaavgreiðslu
- hug at læra og at læra av sær
- evni at samstarva

Fólk við útbúgving innan edv kunnu hava fyrimun. Hinvegin vilja fólk, sum annaðhvørt gjøgnum útbúgving ella av øðrum royndum hava gott menniskjainnlit - duga væl við kundum - vera áhugaverd.

**Vit bjóða:**
- innanhýsis útbúgving
- arbeiðsøki í stórari framgongd
- arbeiðsøki har menningin gongur sera skjótt

Størvini verða at seta skjótast gjørligt og vera lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Eftir nýggjár letur Føroya Tele upp egnan integreraðan dagstovn í samstarv við Tórshavnar Kommunu, har starvsfólk á Føroya Tele hava framihjárætt til ansingarpláss.

Hevur hetta tín áhuga og ynskir tú at hoyra nærri um starvið, kanst tú venda tær til Aksel Haraldsen, depilsleiðara ella Tummas Simonsen, bólkaleiðara, tlf. 303030.

Umsóknir skulu verða Starvsfólkadeildini hjá Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 21. januar 2002 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt, og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE

Skapið framtíðina saman við okkum!